## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur upp í skirð av útnyrðingi , seinnapartin nakað minni vindur av norði. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 0 og +3 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur ella skrið av norði, seinnapartin nakað minni vindur. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum ÷2 og +1 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og sólglottar, men eisin okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷3 stig og frostmarkið.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í ein strúk av norði og kavaælingur, Hitin um frostmarkið. Týsdagin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Nákað lýggjari.

# Sverre trý-kvarthundrað

**MÓTTØKA**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað var fitt av fólki samankomið í høllini í Trongisvági at heiðra Sverra Midjord, tá skipað varð fyri stásiligari móttøku í samband við, at tvørámaðurin, politikarin og ítróttarmaðurin Sverre Midjord fylti 75 ár 2. apríl 2008.

Ein legði til merkis, at við Smyrli vóru komin fleiri at heiðra Sverra, ið kend eru av politiska pallinum, bæði nú og fyrr. Núverandi og fyrrverandi løgtingsmenn, løgmaður, lands- og kommunalpolitikarar, vinir og kenningar og tvøráfólk og suðuroyingar annars savnaðust hesa løtuna.

Tónleikararnir Hentzar Hammer og Terji Nielsen spældu hugnatónleik og John Danielsen, kendur valari, eins og Sverre, sang nøkur løg. Tvøroyrar Hornorkestur setti eisini dám á við góðum hornblástri, og serliga væl ljómað ein samanseting av TB-sanginum og Tvørásanginum. Børn í frítíðarskúlanum á Tvøroyri sungu eisini fyri Sverra.

Mangar røður vóru hildnar og felagsangur var, ið vágsskaldið NePtuN hevði sett saman til løtuna.

Sverre er kendur sum undangongumaður innan ítrótt og sum lands- og kommunalpoitikari í útvið 50 ár. Hann var borgarstjóri á Tvøroyri í 18 ár.

Í høllini hevði Sverre fingið sær søguligan stól at sita á, nevniliga sessin úr løgtinginum, sum hann sat á sum tingmaður í sjeytiárunum, og sum eittnú Petur Mohr Dam eisini hevur sitið á.

At móttøkan var í høllini í Trongisvági er helst hóskandi, tí eisini her átti Sverre sín stóra lut í, at høll og skúli gjørdust veruleiki.



*Í høllini hevði Sverre fingið sær søguligan stól at sita á, nevniliga sessin úr løgtinginum, sum hann sat á sum tingmaður í sjeytiárunum, og sum eittnú Petur Mohr Dam eisini hevur sitið á*

*Mynd. D.Olsen*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -24 |
| Nuuk | -17 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1003 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið skamt vestan fyri Føroyar fer í landnyrðing.



**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir og dýpist. Tað gevur liggjandi høgætt við nógvin vindi á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/3 kl. $06^{00}$ – 27/3 $06^{00}$. Hitin í gjár: 2°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 26/3 kl. $06^{00}$ – 27/3 $06^{00}$.
Avfallið higartil í apríl: 96 mm




Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

26. mars – Mánin longst frá jørðini
29. mars – Seinna kvarter
6. apríl – Tendring
7. apríl – Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3.apríl | 5:09 | 17:30 | 4:09 | 16:30 | 4:24 | 16:45 | 7:09 | 19:30 | 8:09 | 20:30 | 3:24 | 15:45 | 2:24 | 14:45 | 5:24 | 17:45 | 6:24 | 18:45 | 4:54 | 17:15 | 6:09 | 18:30 |
| 4.apríl | 5:51 | 18:12 | 4:51 | 17:12 | 5:06 | 17:27 | 7:51 | 20:12 | 8:51 | 21:12 | 4:06 | 16:27 | 3:06 | 15:27 | 6:06 | 18:27 | 7:06 | 19:27 | 5:36 | 17:57 | 6:51 | 19:12 |
| 5.apríl | 6:34 | 18:57 | 5:34 | 17:57 | 5:49 | 18:12 | 8:34 | 20:57 | 9:34 | 21:57 | 4:49 | 17:12 | 3:49 | 16:12 | 6:49 | 19:12 | 7:49 | 20:12 | 6:19 | 18:42 | 7:34 | 19:57 |
| 6.apríl | 7:20 | 19:44 | 6:20 | 18:44 | 6:35 | 18:59 | 9:20 | 21:44 | 10:20 | 22:44 | 5:35 | 17:59 | 4:35 | 16:59 | 7:35 | 19:59 | 8:35 | 20:59 | 7:05 | 19:29 | 8:20 | 20:44 |
| 7.apríl | 8:08 | 20:32 | 7:08 | 19:32 | 7:23 | 19:47 | 10:08 | 22:32 | 11:08 | 23:32 | 6:23 | 18:47 | 5:23 | 17:47 | 8:23 | 20:47 | 9:23 | 21:47 | 7:53 | 20:17 | 9:08 | 21:32 |